**FISKIMÁLARÁÐIÐ**
LØNJAVNINGARSTOVAN

# Skrivstovufólk til Lønjavningarstovuna

Starv sum skrivstovufólk á Lønjavningarstovuni verður hervið lýst leyst til setan frá 01. mars 2005 at rokna.

Lønjavningarstovan er skipað sum deild í Fiskimálaráðnum.

**Starvið fevnir m.a. hesar uppgávur:**
- viðgerð og avgreiðslu av fiskivinnustudningum
- telefonavgreiðslu
- aðrar fyrifallandi uppgávur

**Førleikakrøv:**
- viðkomandi útbúgving
- góð evni at samskifta við fólk
- hollan telduførleika á brúkarastøði
- góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni
- starvsroyndir innan líknandi starvsøki er ein fyrimunur

**Setanartreytir:**
Løn- og setanartreytir eru sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og deildir/stovnar tess, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Lønjavningarstovan.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

Til ber at ringja til Fiskimálaráðið tel 353030 og Hanni Thomsen deildarstjóri kann geva neyvari upplýsingar um starvið.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum, cv og møguligum viðmælum, skulu vera Lønjavningarstovuni í hendi í seinasta lagi hósdagin 10. februar 2005 kl. 12:00.

Umsóknir skulu sendast til:

**Lønjavningarstovan,**
**Postsmoga 347,**
**110 Tórshavn**

Alzheimerfelagið

# Starvsfólk til Miðstøðina fyri minnisveik

Søkt verður eftir starvsfólki, til demensdagtilhaldið við Dalavegin, at seta sum skjótast. Dagtilhaldið er opið í dagtímunum allar yrkadagar.

**Vit bjóða**
Eitt áhugavert og avbjóðandi starv innan demensøki, har arbeitt verður eftir nýggjum umsorgsteoriunum, sum stimbra tann sjúka psykososialt. Eitt starv har tú ert við til at røkka settu málum og at seta tín dám á stovnin.

**Førleikakrøv**
- hug og hegni at vera um persónar við demens
- ávísa vitan og/ella royndir innan demens
- vera fleksibil, positivur og hava góð samstarvsevni
- hava tol og empati

Til starvið krevst útbúgving sum sjúkrarøktarfrøðingur, ergoterapeutur, heilsuhjálpari/-røktari, pedagogur ella onnur líknandi útbúgving. Tað er ein fyrimunur at hava eftirútbúgving sum demenssamskipari.

Miðstøðin fyri minnisveik er ein 2 ára long royndarverkætlan. Starvið er tí tíðaravmarkað til 30. juni 2006. Møguleiki er fyri niðursettari tíð.

Løn sambært Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Ernu Háberg, leiðara á tlf. 318102 ella 228004
Frágreiðing um verkætlanina stendur at lesa á www.alzheimer.fo

Umsóknarfreistin er **hósdagin 27. januar 2005**.
Umsókn saman við viðmælum, upplýsing um útbúgving og royndir skal sendast til:

**Miðstøðin fyri minnisveik**
Dalavegur 4
FO 100 Tórshavn

# Innskriving av næmingum

til 1. flokk komandi skúlaár verður í skúlanum hósdagin 27. janaur kl. 13.00.

Havið dóps- ella navnaseðil við.

**Tofta skúli**
**Tlf. 447332**

## SEYMING Í FUGLAFIRÐI
### Uppi á loftinum í Piddasahandli

**Kreativ seyming – úr nýggjum og gomlum**

| | | |
|---|---|---|
| Dagskeið í viku 5 og 9: | Kl. 10.00-14.30 | (mán - týs - mik - hós) íalt 48 tímar |
| Dagskeið í viku 6 og 10: | Kl. 10.00-14.30 | (mán - týs - mik - hós) íalt 48 tímar |
| Kvøldskeið í viku 8 g 14: | Kl. 18.00-22.30 | (mán - týs - mik - hós) íalt 48 tímar |

Lærari: Oddvør á Lakjuni Tel 444 440/26 86 90
Kostnaður: 200,- kr. + 2 kr/t

**Fuglafjarðar Kvøldskúli**

# Lærari til Porkeris skúla

Vegna farloyvi verður søkt eftir lærara til 9 t/viku frá 14. februar og til 30. juni 2005.

Tímarnir vera undirvístir týsdag, ónsdag og tórsdag fyrrapart.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi ónsdagin 2. februar.

Nærri fæst at vita frá skúlaleiðaranum
tlf. arb. 373253 ella 262864.

**Porkeris skúlastýri**
**v/ Elken Bech, form.**
**FO 950 Porkeri**

## Bahá'í Miðstøðin
# Bønarmøti

**Mánadag 24. januar 2005 kl. 20.00**
**Øll eru vælkomin**

Tilverunnar tempul er mítt hásæti;
reinska tað fyri allar lutir,
at eg har kann seta búgv og
har verða verandi.
***Bahá'u'lláh***

## Suðurstreymoyar Javnaðarfelag

Limafundur verður týskvøldið 25. januar kl. 20.30.
Evnið: Fólkatingsvalið.

Fundurin verður í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, J. H. Schrøtersgøta 9.

Øll javnaðaráhugað eru vælkomin.

**Nevndin**

PW

# Fólk til matvøruhandil á Skála

Søkt verður eftir fólki til nýggjan matvøruhandil á Skála, at arbeiða kvøld/vikuskiftisvaktir.
Skal vera min. 18 ár.
Meira fæst at vita við at ringja til leiðarin
á tlf. 741412